## Pf. Luna keypt bláa flakavirkið í Sørvági

Beint fyri ársskiftið varð greitt, at pf. Luna hevði keypt bláa flakavirkið frá spf. Vesturskin í Sørvági. Hóast munnlig avtala var gjørd um handil, varð hetta ikki formliga avgreitt fyrrenn tá, skrivar heimasíðan hjá Sørvágs kommunu. Á fundi í farnu viku vóru seinastu viðurskiftini fingin upp á pláss: Leigusáttmálin við Sørvágs kommunu og keypssáttmálin millum keypara og seljara vórðu undirskrivaðir, og handilin sostatt vorðin veruleiki. Ætlandi fara fólk frá pf. Luna undir at gera bygningin kláran til kryvjing av alilaksi fyrst í nýggja árinum. Pf. Luna hevur aliloyvir á Gøtuvík, Miðvági og á Sørvágsfirði, og eru ætlanir felagsins at kryvja fiskin úr øllum hesum støðum á virkinum í Sørvági. Enn er ikki greitt nær nýggja virkið verður klárt at taka ímóti laksi, men inntil tá verður kruvt á gamla virkinum sum felagið eigur í Sørvági.



# Tríggir bussar um tíman

**Um einar 2-3 vikur fer Tórshavnar kommuna at økja um koyringina við Bussleiðini. Bussarnir fara tá at koyra tríggjar ferðir um tíman í arbeiðstíð**

BUSSAR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*




*Ókeypis koyringin við Bussleiðini er væl umtókt millum Havnarfólk. Skipanin heldur fram í ár við øktum tilboði*

**Havn:** Ætlanin var upprunaliga, at koyringin skuldi økjast enn meiri. Miðað varð nevniliga eftir at víðka um tilboðið til eisini at umfata kvøld- og vikuskiftistúrarnir.

Men hesum fekst ikki undirtøka fyri.

- Vit økja tí fyrst koyringina í dagtímunum. So fáa vit at síggja, hvussu víðari verður, sigur Marin Katrina Frýdal, forkvinna í teknisku nevnd í Tórshavnar kommunu.

Í løtuni er øll skipanin til hoyringar í umsitingini, og tá viðmerkingarnar eru liðugt umrøddar, kann skipanin setast í verk.

Skipanin hevur verið sera væl móttikin av fólki, síðani hon varð sett í gildi fyri einum ári síðani. Mangar túrar hava bussarnir verið fullsettir.

### Fleiri bussar

Upprunaliga var ætlanin at nýggja og økta skipanin skuldi setast í verk frá komandi mánadegi, men hesum málinum rakk ein ikki.

Ístaðin verður miðað eftir at fáa skipanina setta í verk í næstum, helst seinast í hesum mánaðinum.

Til tess at økja koyringina krevjast fleiri bussar. Hesir komu til landið fyri jól, og verða klárir at koyra, tá skipanin er til reiðar.

Nýggja ferðaætlanin verður soleiðis, at bussarnir fara at koyra tríggjar ferðir um tíman í arbeiðstíð, men skipanin í fyrsta umfari verður óbroytt um kvøldini og vikuskiftini.

Sum skilst verða leiðirnar stórt sæð tær somu.

Hagtølini vísa, at fólk ferðast dúgliga við bussunum. Í 2006 metti ein at 700.000 fólk brúktu Bussleiðina, og talið í 2007 er munandi hægri.

# Fullkomið forboð fyri fýrverki

**Gongur soleiðis sum ES ætlar kann eitt fullkomið forboð fyri fýrverki koma í gildi longu í ár. Úrslitið kann vera, at fólk ikki sleppa at nýta øll sløg av fýrverki við ársskiftið 2008/09**

NÝGGJÁR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Fýrverk kann vera vandamikið – men kanska er tað ein saga blott um stutta tíð*

*(savnsmynd)*

**Noreg:** Rættilig ferð er komin á kjakið um, hvussu fólk handfara fýrverk tá tað nýggja árið skal skjótast inn.

Her kann koma uppá tal, at banna tað teir kalla pinna-rakettum, meðan teir fara at loyva jørð-rakettum uttan pinnar.

Eitt ES-fyriskipan, sum fyri stuttum er kunngjørd sigur týðiliga og greitt, at alt fýrverk skal bæði góðkennast og verða roynt av serkunnleikanum, áðrenn tað kemur á marknaðin.

Í onkrum londum á europeiska meginlandinum er ein sinnaður at fara so mikið langt, at eitt fullkomið forboð kann verða sett í gildi fyri mannin á gøtuni.

Norskir myndugleikar kanna í løtuni, hvat teir skulu siga og halda um rakettir við stýripinnum. Norsk bløð skriva kortini, at lítið týðir uppá at eitt fullkomið forboð verður sett í verk.

- Skal eitt slíkt stig setast í verk, má ein politisk avgerð til, sigur Siri Hageheugen frá Direktoratet for samfunnssikkerhet og beredskap við norska blaðið VG.

Dentur verður serliga lagdur á, at teir nógvu skaðarnir av fýrverki hava gjørt sítt til, at ein umhugsar eitt slíkt stig. Bara á Haukeland Universitetssykehus varð boðað frá 21 eygnaskaðum bæði á børn og ung orsakað av fýrverki.

Av hesum kunnu seks teirra vænta at missa sjónina fullkomuliga.

### Ynskja strangari reglur

Ein yvirlækni á sjúkrahúsinum, Nils Bull er sannførdur um, at eitt forboð er rætta leiðin at ganga.

- Tað nyttar lítið at seta forboð í gildi móti rakettunum, tá fýrverkið á jørðini er eins vandamikið og hitt, sigur hann.

Tí eru fleiri sinnað at seta forboð ímóti øllum sløgum av fýrverki, eins og ES-fyriskipanin leggur upp til.

Ein teirra er brigaduleiðarin hjá sløkkiliðinum í Oslo, Bjørn Lind, sum heldur tað beinleiðis vera óforsvarligt at lata amatørar handfara fýrverk.

Hansara hugsan er, at ein ístaðin eigur at lata serkøn fólk taka sær av hesum, og síðani lata almennar myndugleikar skipa fyri einum stórfingnum og vøkrum felags fýrverk lokalt.

Norska tilbúgvingin gjørdi í 2006 eina kanning sum vísti, at 7 av 10 norðmonnum ynskja strangari reglur við fýrverki.

Helvtin av teimum spurdu løgdu tó dent á, at tey vóru ímóti einum fullkomnum forboði móti rakettum, meðan 38 % vóru fyri.